# Vodafonedeildin í gongd

**FÓTBÓLTUR** Fyrsti landskappingardysturin hjá monnum í 2011 verður spældur í morgin, tríggir sunnudagin og tann fimti mánakvøldið. B71, sum enn ikki hevur nýggja graslíki klárt, spælir sín fyrsta heimadyst á Argjum

Hilmar Jan Hansen

Mong hava bíðað spent eftir fyrsta bríkslinum til landskappingina í Vodafonedeildini í ár, og tey, sum vilja hoyra og uppliva tað, kunnu møta upp við Margáir í morgin klokkan 17, tá fyrsti dysturin verður spældur har millum EB/Streym og Víking.

Hetta eru tvey av fleiri liðum, ið kunnu væntast at gera seg galdandi. Serliga hevur EB/Streymur víst góðar taktir, ikki minst í Stórsteypadystinum fyri tveimum vikum síðani, men eisini Víkingur hevur ætlanir um at koma langt í ár. Í fyrsta umfari í kappingini um Løgmanssteypið fyri viku síðani syrgdu hesi bæði liðini fyri, at Havnin einki lið hevur í steypakappingini longur, tí EB/Streymur vann á B36 og Víkingur á HB.

Sunnudagin er bara tann eini dysturin vanliga dystartíð, og tað er tann við Løkin í Runavík millum NSÍ og HB. Hetta vóru tey bæði liðini, ið áttu oddasessin í kappingarárinum í fjør mestsum alla tíðina, men tá avtornaði fór HB avstað við meistaraheitinum og NSÍ mátti taka til takkar við triðjaplássinum. Dystirnir millum hesi bæði í Runavík kunnu enda við hvørjum sum helst, og so fæst at síggja, um tað eru runavíkingar ella havnarmenn, ið eru skjótari úr startholinum.

### B71 heima á Argjum

Hinir báðir dystirnir sunnudagin eru seinni um dagin. 07 Vestur og B36 spæla í Sørvági, har vágamenn enn eina ferð taka ímóti sum uppflytarar. Teir fingu eina fína byrjan í steypakappingini, tá teir vunnu sannførandi á FC Suðuroy, sum hinvegin er farið niður í næstbestu deildina. B36 yvirlivdi ikki í steypakappingini, men vísti dygdir ímóti EB/Streymi, so dysturin sunnudagin kann saktans vera ein javnur dystur, ið kann enda við bæði einum og øðrum úrsliti.

Hin seini sunnudagsdysturin er eitt sindur serligur, tí hóast tað er B71, sum hevur heimavøll ímóti KÍ, verður hann spældur á Argjum. Hetta skyldast, at nýggi graslíkisvøllurin á Sandi ikki er klárur enn, so tí er B71 farið av oynni til henda fyrsta heimadystin. B71 formáddi sær lítið í sínum steypadysti ímóti NSÍ, meðan KÍ vann – men heldur ikki stórt meira enn tað – ímóti Undrinum, ið spælir í triðbestu deildini. Talan er neyvan um tvey lið, vit skulu síggja í kappingini heilt har frammi, men fyri tað kann dysturin teirra millum gerast bæði javnur og spennandi.

Fimti dysturin í fyrsta umfari í Vodafonedeildini verður mánakvøldið á Toftum, tá B68 tekur ímóti ÍF. Hesi bæði liðini vunnu stórsigrar í steypakappingini fyri viku síðani, so um tey megna at liva upp til tað, verður talan um eina málríka uppgerð á Svangaskarði. B68 er kanska aftur til reiðar at koma longur uppeftir, meðan ÍF eftir frálíka kappingarárið í fjør skal royna at halda stand og vísa, at liðið megnar at halda seg í tí endanum, har kappingin er stuttligust.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Føroyameistararnir í fjør, HB, skulu í sínum fyrsta landskappingardysti í ár leggja fyri á útivølli við Løkin ímóti NSÍ, sum vann bronsu í fjør*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# FaroeSoccer ynskir hjálp

**FÓTBÓLTUR** Heimasíðan, ið borðreiðir við úrslitum og hagtølum frá føroyskum fótbólti, heitir nú á feløgini umvegis sínar heimasíður at hjálpa eitt sindur til, so lættari er at halda skil á, nær dystir verða spældir

Hilmar Jan Hansen

Tað er neyvan ov nógv sagt, at heimasíðan hjá FaroeSoccer meira ella minni hevur kollvelt atgongdina til úrslit, hagtøl og annað, ið fótbóltsáhugað fegin vilja vita sum skjótast um vikuskiftini, men eisini aðrar tíðir.

Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði, ið krevur nógvar hjálpandi hendur, skal tað bera til hjá FaroeSoccer at veita ta tænastu, fólk munnu hava vant seg við, nú heimasíðan fer í gongd við sítt annað kappingarár, og tí heitir Faroe Soccer nú á feløgini um at hjálpa eitt sindur til, so lættari er at halda skil á, nær dystir verða spældir.

Øll feløgini hava egnar heimasíður, og tí hevur FaroeSoccer biðið tey um at gera sær ómak við at siga frá, nær tey spæla heimadystir í teimum kappingum, FaroeSoccer skrásetir. Fleiri feløg gera hetta longu, so tí er áheitanin meira vend at teimum feløgum, ið ikki hava fingið hetta í eina fasta legu á heimasíðu síni.

Ikki bara lættir hetta um hjá teimum, sum hava áhuga í at fylgja við hagtølunum og øllum tí, men samstundis ger hetta tað eisini munandi lættari hjá feløgunum sjálvum, at tey sleppa undan í heilum at ringja runt við dystarboðum, um allar dystarásetingar eru at finna á heimasíðuni.

hilmarjan@sosialurin.fo

**VODAFONEDEILDIN**

| | | |
|---|---|---|
| 09/04 | 17.00 | EB/Streymur - Víkingur |
| 10/04 | 15.00 | NSÍ - HB |
| 10/04 | 17.00 | 07 Vestur - B36 |
| 10/04 | 17.15 | B71 - KÍ (Argir) |
| 11/04 | 18.00 | B68 - ÍF |

**SUNSET-KAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 08/04 | 19.00 | Tjaldur - VÍF |
| 08/04 | 20.00 | StÍF - VB |
| 10/04 | 14.30 | Neistin - Stjørnan |

**ATL. AIRWAYS-KAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 08/04 | 19.00 | StÍF - KÍF |
| 09/04 | 18.00 | H71 - VÍF |
| 10/04 | 16.00 | Neistin - T. Klaksvík |

# Rógvi skal hjálpa HB

**FÓTBÓLTUR** 20 ára gamli argjamaðurin, Rógvi Poulsen, kemur heim úr Onglandi at hjálpa HB fram til summarsteðgin, nú Andrew av Fløtum er skaddur og ikki fær spælt

Hilmar Jan Hansen

Rógvi Poulsen hevur síðstu tíðina verið knýttur at enska fótbóltsfelagnum, Crewe Alexandra, kemur nú heimaftur til føroyskan fótbólt. Rógvi, sum hevur verið ein týðandi spælari á HB-liðnum síðstu árini, hevur ikki fingið vunnið sær pláss á liðnum hjá Crewe enn, og tí kann skifti avgreiðast skjótt og ómaksleyst.

Sum skilst, er spæliloyvið ongantíð endaliga flutt til Onglands, og tí kann hann beinanvegin rætta HB eina hjálpandi hond, so helst verður hann at síggja í hópinum longu sunnudagin, tá HB spælir á útivølli ímóti NSÍ.

HB-heimasíðan skrivar, at Havnar Fótbóltur og Rógvi Poulsen eru komin ásamt um at gera eina avtalu, so hann spælir við HB fram til summarsteðgin. Sostatt kann Rógvi eisini halda seg í formi og fáa dystarvenjing, tá steðgur verður í ensku kappingini.

Skiftið skal ikki skiljast, sum at Crewe ikki framvegis hevur áhuga fyri Rógva, tí avtalan merkir eisini, at umboð fyri Crewe koma til Føroya at síggja Rógva í dysti fyri bæði HB og landsliðið.

hilmarjan@sosialurin.fo